## Robinho góða byrjan

Brasilski Robinho er fluttur heim aftur til Brasil at spæla, og hann fekk óføra byrjan í nýggja felagi sínum, Santos, um vikuskiftið. Felagið vann 2-1 í útidysti ímóti Sao Paolo, og Robinho fekk avgerandi ávirkan á dystin. Fimm minuttir fyri leiklok skoraði Robinho, sum kom á vøllin í seinna hálvleiki, til 2-1, og tað varð úrslitið av dystinum.




## Mourinho fegnast um sjálvsálit

Inter er ikki til at steðga í italsku fótbóltskappingini. Nú er felagið 10 stig frammanfyri næstu feløgini í deildini, og venjarin fegnast um, at hansara spælarar eru væl fyri. - Úrslitini í januar hava givið okkum stórt sjálvsálit, og vit trúgva upp á okkara egnu evni, sigur Jose Mourinho við Football Italia. Um vikuskiftið vann Inter 3-0 á Cagliari.

# So sum so lutakast

**Høgni í Stórustovu kundi hvørki grína ella gráta, tá lutakastið var av í gjár. – Tað kundi verið verri og tað kundi verið betri, ljóðar staðfestingin frá forsetanum í FSF**



rolant@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam




Talan var ikki um nakað beinleiðis gullnám, men Høgni í Stórustovu ásannar, at tað kundi eisini verið munandi verri

Dreymurin um Ongland brast – enn einaferð. Hinvegin komu vit í sama bólk sum heimsmeistararnir Italia. Norðurírland er eisini áhugavert bæði ítróttarliga og fíggjarliga, men tá tað kemur til Estland, Slovenia og Serbia er tað so sum so.

– Vit eru í niðasta bólkinum, tá liðini verða styrkismett og eingin jublar, tá Føroyar verða tiknar úr pottinum. Kortini eru vit vónsvikin, tá vit ikki møta Onglandi og tíma als ikki at møta Frankaríki aftur nú, og Italia er heldur ikki betri enn næstbest. Tað sigur ikki lítið um fótbóltsverðina, sigur Høgni í Stórustovu.

Hann var í pólska høvuðsstaðnum í gjár saman við Magnus á Stongum, formanni í landsliðsnevndini, Virgar Hvidbro, aðalskrivara og Brian Kerr, landsliðsvenjara.

### Eingin fíggjarligur dreymur

Hóast hann sjálvur vísir á, at lutakastið kundi verið so nógv verri, so dylir hann ikki yvir, at reint fíggjarliga var ikki talan um nakað dreymalutakast.

– Vit hava eina sjónvarpsavtalu galdandi frá 2010 til 2014. Henda hevur eina grundupphædd, sum vit avtalaðu í felag, men um vit drógu okkurt annað land, enn tey vit drógu í gjár, hevði møguleiki verið fyri at fingið nakrar krónur aftrat í kassan, sigur Høgni í Stórustovu.

Men hóast Fótbóltssambandið eftir øllum at døma ikki kemur at spinna gull upp á hetta lutakastið, sær forsetin kortini fleiri ljóspunkt.

– Ítróttarliga sær tað spennandi út við Norðurírlandi og Estlandi. Og alt eftir hvussu tað gongst Italia, Serbia og Slovenia í Suðurafrika í summar kann tað verða heilt áhugavert, sigur forsetin.

### Næsta stigið í mars

Høgni í Stórustovu og restin av føroyska ferðalagnum í Póllandi vendu nøsina heimaftur í gjárkvøldið. Næsta uppgávan í samband við lutakastið í gjár verður 8. mars, tá londini í bólki C hittast aftur fyri at viðgera, hvussu dystirnir skulu leggjast.

– Her eru vit í eini serligari støðu, tí hini londini vita øll, at tað ikki er bara sum at siga tað, at koma til Føroya um heystið, tá tað er myrkt og veðrið er keðiligt. So er tað okkara uppgáva at brúka hesa støðu best møguligt, sigur Høgni í Stórustovu, forseti í FSF.

# Grannar okkara hittast

**Ísland, Danmark og Noreg endaðu øll í sama bólki til komandi EM-undankapping, men eisini í øðrum bólkum eru spennandi grannauppgerðir**



rolant@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam


Merkisvert fyri lutakastið til komandi EM-undankapping er, at nógvar áhugaverdar granna uppgerðir eru at finna.

Trý av Norðurlondunum hittast í bólki H, har bæði Danmark, Noreg og Ísland eru at finna. Hesin bólkur er serstakliga áhugaverdur, tí umframt Norðurlendsku grannarnar, eru eisini Portugal og Kypros eisini við her.

Fíggjarliga kundi Danmark valla ynskt sær ein betri bólk, og ítróttarliga er tað heldur ikki av leið, tí Danmark hevur havt takið hesum londum seinastu ferðirnar, tey hava dystast.

Seinastu HM-undankapping fekk Danmark nevniliga fýra av seks stigum móti Portugal. Tað sama gjørdi seg galdandi, tá Noreg og Danmark hittust í EM-undankappingini í 2002-2003.

Í 2006 og 2007 spældu Danmark og Ísland tveir EM-undankappingardystir. Hesar vann Danmark tilsamans 5-0, og seinast Kypros og Danmark hittust var í 1995 og 1996. Hesar dystir fekk Danmark fýra stig burtur úr.

Við øðrum orðum hevur Danmark ikki tapt ein einasta dyst í móti hesum londum seinastu 15 árini. Av tí sama meta danir seg hava góðar møguleikar at spæla seg víðari til EM-endaspælið, sum verður í Ukreina og Póllandi í 2012.

Hóast meiri enn helvtin av londunum í bólki H eru úr Norðurlondum, eydnaðist tað kortini at fáa eina norðurlendska uppgerð aftrat, tí í bólki E hittast Svøríki og Finnland.

Bretar hava eisini okkurt at gleða seg til, tí í bólki G hittast Ongland og Wales, og í bólki A hittast Týskland og Eysturríki.

**A:**
Aserbadjan
Kasakstan
Belgia
Eysturríki
Turkaland
Týskland.

**B:**
Andorra
Armenia
Makedonia
Írland
Slovakia
Russland

**C:**
Føroyar
Estland
Slovenia
Norðurírland
Serbia
Italia

**D:**
Luksemburg
Albania
Hvítarussland
Bosnia-Hersegovina
Rumenia
Frankaríki

**E:**
San Marino
Moldova
Ungarn
Finnland
Svøríki
Holland

**F:**
Malta
Georgia
Letland
Ísrael
Grikkaland
Krotia

**G:**
Montenegro
Wales
Bulgaria
Sveits
England

**H:**
Ísland
Kypros
Noreg
Danmark
Portugal

**I:**
Liechtenstein
Litava
Skotland
Kekkia
Spania